Kappingareftirlitið

Sp/f Einherjar
Fjarðavegur 10
350 Vestmanna

Att. Jákup Oluf í Skálum

Tórshavn, tann 18-02-2025

Viðv. mál nr.: 24/00563

Kappingareftirlitið fekk tann 15. januar 2025 einfalda fráboðan, sbrt. § 14, stk. 1, nr. 1, um, at Sp/f Einherjar yvirtekur P/f Vestpack. Talan er um eina vantandi fráboðan, har felagið eftirfylgjandi hevur fráboðað Kappingareftirlitinum um yvirtøkuna.

Talan er um eina transaktión sum kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 2 tá ið ein ella fleiri persónar, sum longu hava ræðið á minst einari fyritøku, ella tá ið ein ella fleiri fyritøkur við keypi av pørtum ella ognum gjøgnum avtalu ella á annan hátt fáa beinleiðis ella óbeinleiðis ræði á allari ella pørtum av einari ella fleiri fyritøkum afturat.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí luttakandi fyritøkurnar høvdu samanlagt í Føroyum ein árliga umsetning sum er 75 mió. kr. ella meir og minst tvær av luttakandi fyritøkunum hava 15 mió. kr. í umsetningi seinasta árið, sbrt. §14, stk. 1, nr. 1 í Kappingarlógini.

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí ongin av luttakandi fyritøkunum virka á saman vøru- og landafrøðiliga marknað og ongin av luttakandi fyritøkum eru á einum ovara ella niðara marknað til ein marknað har onnur luttakandi fyritøka er virkin, sbrt. §3, stk. reglugerð nr. 2 frá 3. januar 2025.

Sp/f Einherjar er ein fyritøka við heimstað í Føroyum. Sp/f Einherjar var stovna við tí endamálið, at keypa allan partapeningin í P/f Vestpack. Felagið hevur ikki annað virksemi.

P/f Vestpack er ein fyritøka, sum fæst við framleiðslu av plasti og etikettum. Eisini er P/f Vestpack heildaveitari av pakkitilfari og tí sum fylgir í kjalavørrinum av tí. P/f Vestpack hevur heimstað í Vestmanna.

Kappingareftirlitið

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna keypi hjá Sp/f Einherjar av P/f Vestpack, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini um at ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Vegna

Kappingareftirlitið

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friðuson Andreasen
Fulltrúi